# Nú skal Eclipse standa sína roynd

**Leygarkvøldið letur nýggi náttklubbin í Havn alment upp. Fyrsta kvøldið verður ein gamal kenningur plátuvendari**

DANSISTAÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



Leygarkvøldið verða dyrnar fyri fyrstu ferð lætnar upp fyri almenninginum í nýggjasta dansistaðnum í Havn.

Eclipse er navnið á náttklubbanum, sum heldur til í hølunum, har Club 20 hevur verið mongu seinastu árini.

Talan er um eitt tað mesta vitjaða staðið í landinum, tá ið tað snýr seg um dans, og nú verður eitt nýtt konsept roynt í hølunum, sum eru nógv broytt, síðani Club 20 læt aftur.

Eclipse er ætlað teimum ungu, sum eru komin fram við tannáringaárunum, og tí verður strangt 21 ára aldursmark í Eclipse.

Tað er Elisa Heinesen, sum er sniðgevi í London, sum hevur staðið fyri arbeiðnum at innrætta nýggja dansistaðið.

Fyrsta kvøldið eru onkur serlig tilboð á skránni, og ein gamal kenningur fer at venda plátum. Tað er Heðin Arge, sum seinastu árini hevur tikist meira við útvarpsarbeiðið enn at verið plátuvendari.

## Tøkk



Eina hjartans tøkk sendi eg øllum tykkum, sum við gávum, blómum og heilsum gleddu meg á 70 ára føðingardegi mínum tann 6. august í ár. Ein serlig tøkk til øll tykkum, sum stukku inn á gólvið føðingardagin.

Við bestu ynskjum

**Henry Jarnskor**


STARVSLÝSING

## Fishin.fo

Søkt verður eftir fólki til eitt tíðaravmarkað starv (4 mánaðir) til eina verkætlan, har tilfar skal skrivast til eina heimasíðu, ið fær heitið www.fishin.fo. Arbeiðið umfatar at savna og skipað relevant tilfar og gera skrivligt tilfar á enskum at leggja út á heimasíðuna.

www.fishin.fo verður ein heimasíða, sum fer at innihalda sakligar upplýsingar um viðurskifti, sum hava við føroyska fiskiveiðu/-vinnu, alivinnu, grindaveiðu og havumhvørvi at gera. Heimasíðan verður á enskum máli.

### ENDAMÀL

Endamálið við heimasíðuni er at fáa fylgjandi boðskap til umheimin um føroysku fiskivinnuna:

- Havið og fiskur er okkara tilverugrundarlag, tí er hav-umhvørvið – herundir burðardygg veiða og umhvørvisvernd – okkara fremsta raðfesting
- Vit hava virðing fyri náttúru og tilfeingi, og hava eina globala visión uppá fiskiskap

### FØRLEIKAKRØV

Vit hugsa okkum ein persón, sum hevur eina fjølmiðla- ella kunningarútbúgving og samstundis hevur góðan førleika til at skriva enskt. Útbúgvingin er ikki altavgerandi fyri verkætlanina, persónurin skal hava evnini at duga at miðla ein boðskap og arbeiða sjálvstøðugt.

Løn- og setanarviðurskifti verða sambært avtalu millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Menningarstovan bjóðar starvsfólkinum arbeiðsstað við atgongd til allar neyðugar fasilitetir og arbeiðsamboð.

Neyvari upplýsingar og verkætlanarlýsing fáast við at seta seg í samband við Áka Johansen á Menningarstovuni, tlf. 35 31 00.

Umsóknir skulu vera Menningarstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. oktober 2003 kl. 16.00.

**Verkætlanin er eitt samstarv millum Vinnuhúsið, Fiskimálaráðið, Løgmansskrivstovuna og Menningarstovuna. Vinnuframagrunnurin og Fiskivinnuroyndir fíggja verkætlanini.**

**Menningarstovan**
**Bryggjubakki 12**
**P.O. Box 258**
**FO-110 Tórshavn**

**Merkt: fishin.fo**

VINNUHÚSIÐ House of Industry
Fiskimálaráðið Ministry of Fisheries and Maritime Affairs
Menningarstovan Faroe Islands Trade Council
LØGMANSSKRIVSTOVAN Prime Minister's Office


## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Obert Eliasen**

lá sjúkur, andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri sýnda samkenslu og stóru hjálpina, tit veittu okkum. Takk fyri blómur, kransar og heilsanir og takk tit øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Judith, Eli, Julian, Kirstin og Jóna við familjum**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá elskaði maður mín, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Jóhan Ziskason**
(fyrrv. Leiðari á Vaktar- & Bjargingartænastuni)

lá sjúkur, andaðist og varð jarðaður

Tøkk til prest fyri góð ord. Ein serlig tøkk til Monu, Jóhan og Hildibjartur fyri vakran sang og guitarspæl í kirkjuni. Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir. Tøkk til starvsfólkið á B6 á Landssjúkrahúsinum. Somuleiðis hjartans tøkk til tykkum øll, ið á ymiskan hátt hjálptu til, bæði áðrenn og aftaná jarðarferðina. Tøkk til sangarar, kirkjutænarar, berarar, gravarar og tøkk til tykkum øll, ið fylgdu.
Tøkk til tykkum, ið stóðu fyri ervinum.

**Sigrid, Ziska, Kirsten og Johild**



# Góður skurður

**Fjalltíð er, og nógvastaðni er mesta tosið um dagarnar um líkindi og vekt. Og sum heild láta menn væl at skurðinum í ár, eftir sum tað frættist frá**



*Teir vóru á fjalli í Dalhaga hendan dagin, og lótu væl at skurðinum yvirhøvur. Eitt met hildu teir seg seta, tá eitt vanligt hagalamb kom heilt upp á 53 pund*
*Mynd: Edvard Joensen*

SKURÐUR
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Vágamenn láta sum heild væl at skurðinum í heyst. Okkurt einstakt lamb, frætt er frá, er farið upp um 50 pund, og nógvastaðni er bæði nógv og gott komið úr haganum.

Summarið hevur verið sjáldsama gott til gróður og vøkstur sum heild, siga menn, sum hava við seyð at gera. Onkur eldri maður, Sosialurin hevur hitt á máli, vil vera við, at í hansara tíð hevur slíkt ár ikki verið fyrr. Og tað eigur heilt greitt at kunna síggjast aftur á skurðinum, halda teir.

Sandavágsmenn hava verið á fjalli í fleiri hagapørtum, hóast nakrir eru eftir enn. Og har, teir hava rikið, verður látið at, at árið er væl oman fyri meðal. Onkunstaðni er nógv meira skorið, enn fyrr hevur verið og meðalvektin hevur eisini ligið fleiri pund hægri.

Sum nógva aðrastaðni dámar monnum væl at hava heimaseyð, og vanliga eru tað teir sonevndu »køttarnir«, tey smæstu lombini, sum sett verða við. Men í ár hevur tann sjáldsami »truppulleikin« stungið seg upp, at tað eru ov lítið til av smáum lombum.

Í onkrum haga hevur út móti eini helvt av lombunum vigað 50 kg. og meira livandi. Og tá teir so rokna við, at krovið vigar umleið livandi vektina minus eini tíggju í pundum, er greitt, at tað roynist væl. Og tað hevur eisini víst seg soleiðis í flestu førum.

Í Dalhaga settu teir eitt met um dagarnar, vilja teir halda í Sandavági. Haðani varð flett eitt hagalamb, sum fekk vektina upp á 53 pund, og tað vita menn ikki at siga um fyrr, halda teir.

Yvirhøvur láta vágamenn, Sosialurin hevur tosað við, hampiliga væl at skurðinum, hóast onkur er, sum ikki heldur, at tað er so øgiligt í mun til tað vanliga. Men sum skilst á monnum, plagar har at vera rættiliga gott yvihøvur, so útsvingini verða ikki so øgilig, um eitt metár annars er.


Peugeot Coupé 2.0



árg. okt. 1998 · km. 35.000
eyka: Felgur v/vetrardekkum
Sera vælhildin
Til sølu um hóskandi boð fæst!
210 229

Sosialurin 341800



J. Bronckşgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo



JÓLABORÐHALD

Komið við á sera hugnaliga JÓLAFERÐ við Norrönu og haldið Jólaborðhald umborð.

Prísur fyri hvønn úr kr. 600,-
Matur & drekka ikki íroknað

JÓLA-CRUISE ERU HESAR DAGAR:
- 20.–24. nov.
- 27. nov. –1. des.
- 4.–8. des.
- 11.–15. des.

UNDIRHALD
MATUR

Úr havinum
Stórt sildaborð
Royktur og urtaviðgjørdur laksur
Rækjur og skeljadjór

Alskyns steikir so sum:
Stokt dunna við súreplum og sviskum
Fleskasteik við reyðkáli
Roastbeef við remuladu og stoktum leyki
Heilstokt lambstjógv
Heilstoktur oksaháryggur

Flógvir rættir so sum:
Tartelettir við góðari fyllu
Fiskaflak við remuladu
Nýstoktar frikadellur við reyðkáli

Stórt ostaborð
Við stórum úrvali av ostum, víndrúvum o.l.

Dessertborð við m.a:
Heimagjørt rís à la'mande við kirsiberjasós
Fruktsalat við rákremi
og alskyns køkur

Umframt stórt jólaborðhald, verður hvørt kvøld undirhald við føroyskum bólkum og einstaklingum.

20. – 24. Nov:
Undirhald: Robert McBirnie
Orkestur: Jóan Magnus Band

27. Nov.– 01.Des:
Undirhald: Hilmar Jan Hansen
Orkestur: Havkallar v/m.ø. Ronnie Nielsen

04. – 08. Des:
Undirhald: Robert Mc.Birnie
Orkestur: Vestmenn

11. – 15. Des:
Undirhald: Hilmar Jan Hansen
Orkestur: Terje Rasmussen Band

JÓLAKEYP
HUGNI

Keypið jólagávurnar á ferðini
Meðan Norröna liggur í Hanstholm verður skipað fyri innkeypstúri til Thisted.



SMYRIL LINE